MENTAMÁLARÁÐIÐ

Til Jan Lamhauge,
Rógva Olavson og
Rólant Waag Dam

Dagfesting: **23. januar 2018**
Tygara ref.:
Máltal.: **18/00026-11**

**Viðvíkjandi kæru um kringvarpsstýrið**

Tit hava í skrivi til Mentamálaráðið, dagfest 10. jan. 2018, kært stýrið fyri Kringvarp Føroya til Mentamálaráðið. Tit kæra við øðrum orðum skrivið frá stýrinum til tykkara, dagfest 21. des. 2017, har stýrið skrivar:

> *"Viðvíkjandi uppíblanding í generella tíðindaflutningin hevur stýrið hetta at siga: Vit meta tað ikki sum ein truplleika, at stjórin, sum hevur evstu rættarligu ábyrgdina fyri redaksjonella tilfarinum hjá kringvarpinum, er við í innanhýsis kjaki og orðaskifti um tíðindaflutningin. At stjórin ikki hevur journalistiska útbúgving hevur ikki givið stýrinum orsøk at seta honum serligar treytir ella avmarkingar í sínum dagliga virki.*
>
> *Viðvíkjandi gegni er avgerandi, at stjórin sjálvur skilur, hvat ávirkar hansara gegni, og tekur avgerðir eftir hesum. Stjórin sjálvur sigur soleiðis "Eg havi ikki luttikið á nøkrum redaktiónsfundi, har skattamálið er blivið umrøtt – hvørki áðrenn ella aftaná, at JL tann 23. oktober gjørdi meg varugan við ein møguligan gegnistrupulleika." Stýrið tekur hetta til eftirtektar, og metir at stjórin hevur tikið illgrunan um ógegni í álvara og gjørt tað, sum skal til, fyri ikki at persónligu sambond hansara ávirka tíðindaflutningin.*
>
> *Hervið ger kringvarpsstýrið ikki meira við umrøddu atfinningar ímóti kringvarpsstjóranum."*

Í skrivinum til Mentamálaráðið gera tit m.a. vart við arbeiðsumstøðurnar hjá journalistum á stovninum, eins og tit koma við kritikki av stýrinum.

Sagt skal vera frá at sambært § 23 í kringvarpslógini kunnu fyrisitingarligar **avgerðir** tiknar av Kringvarpi Føroya kærast til landsstýrismannin. Ein fyrisitingarlig avgerð sambært kringvarpslógini verður tulkað eins og ein fyrisitingarlig avgerð sambært § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, ið tekur støði í donsku forvaltningsloven.[1] Sambært donsku fyrimyndarlógini merkir avgerðarhugtakið nakað, ið er ella skal vera rættur í einum ítøkiligum føri, sbr. FT 1985/86, tillæg A, sp. 115:

> *"Med udtrykket "truffet afgørelse" sigtes til udfærdigelse af retsakter, dvs. udtalelser, der går ud på at fastsætte, hvad der er eller skal være ret i et foreliggende tilfælde."*

Sambært Kommenteret Forvaltningslov stendur um "beslutninger om tjenstlige forhold":[2]

---

[1] Løgtingsmál 92/1991: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting, bls. 456.
[2] Forvaltningsloven med kommentarer af John Vogter, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (1999), 3. udgave, bls. 120.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

MENTAMÁLARÁÐIÐ

*"Uden for forvaltningslovens anvendelsesområde falder beslutninger, der har karakter af konkrete tjenestebefalinger til ... ansatte, og andre beslutninger, der træffes i forbindelse med myndighedens ledelse og fordeling af de opgaver, som det påhviler myndigheden at varetage (les: ikke avgerðir)."*

Soleiðis sum svarið frá kringvarpsstýrinum er orðað, metir stýrið ikki, at stjórin hevur gjørt nakað galið í mun til uppíblanding, eins og kringvarpsstýrið metir stjóran hava tikið til eftirtektar tað, ið stjórin sigur seg hava sagt viðv. gegninum.

Mentamálaráðið metir ikki, at skrivið frá stýrinum er dømi um eina fyrisitingarliga avgerð, men dømi um nakað, sum stýrið hevur viðgjørt, og sum stýrið innanfyri karmarnar av galdandi leiðslurætti mótvegis stjóranum ikki hevur valt at gera nakað meiri við.

Tá ið skrivið frá kringvarpsstýrinum ikki verður mett sum ein fyrisitingarlig avgerð, ber ikki til at kæra innihaldið í skrivinum frá stýrinum til Mentamálaráðið sambært § 23 í kringvarpslógini, sbr. § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Tó skal sagt vera frá, at Mentamálaráðið í løtuni viðger kæruna um uppsøgnina av Liljuni Weihe, og í tí sambandi verður tilfarið í klaguni møguliga tikið við í eini samlaðari viðgerð av uppsøgnini. Í løtuni er málið sent til ummælis hjá Kringvarpi Føroya, ið skal hava rímiligt høvi at bera fram síni sjónarmið og gera sítt til at upplýsa málið til fulnar.

Vísandi til omanfyri standandi fer Mentamálaráðið at avvísa at viðgera klagu tykkara viðv. skrivinum frá stýrinum, dagfest 21. des. 2017, tí mett verður, at skrivið frá kringvarpsstýrinum fellur uttan fyri fyrisitingarliga avgerðarhugtakið sambært § 23 í kringvarpslógini, sbr. § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Henda avgerð um at avvísa málið er endalig innan fyrisitingina.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Martin Næs
*deildarstjóri*

Torkil V. Rasmussen
*løgfrøðingur*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo